## DAGSINS MEINING

# Stýring má til

Nýggi landsstýrismaðurin í innlendis málum nart í Degi og Viku týskvøldið við spurningin, hvørt tað yvirhøvur er rætt, at kommunur hava eitt íløguloft, sum er ásett av landsmyndugleikunum.

Jógvan við Keldu, sum sjálvur hevur eina fortíð sum borgarstjóri í næst størstu kommununi í landinum tóktist vera sannførdur um, at verandi íløguloft er meira enn bági enn ein hjálp hjá kommununum, og at hann tí væl kundi hugsað sær, at hetta varð tikið burtur.

Í endanum av samrøðuni segði landsstýrismaðurin, at hann í hesum ikki hugsaði lokalt um klaksvíkina, men at hann var landsstýrismaður fyri føroysku kommunurnar, og at hann tí hugsaði um allar kommunurnar í hesum.

Men samstundis gloymdi Jógvan við Keldu at siga, at hann eisini umsitur kommunumál vegna Føroya Fólk. Og sjálvt um tað fyri einstøku kommunurnar við hvørt kann vera irriterandi við einum íløguлofti, so er einki at ivast í, at hetta landsbúskaparliga er eitt av týdningarmestu stýringsamboðunum yvirhøvur.

Fiskivinnuni og tí, sum hartil hoyrir, fáa vit nevnliga als ikki stýrt, og vit tykjast í løtuni enn einaferð at muga ásanna, hvussu ógvusligar konjukturbroytingarnar kunnu vera í okkara viðkvæma búskapi.

Júst orsakað av hesum er byggivinnan á landi kanska besta stýringsamboðið, sum landsstýrið hevur, og tí er eisini alneyðugt við einum íløgukarmi fyri kommunurnar. Hóast orðið »tvingsul« sjáldan verður væl móttikið, so hevur tað landsbúskaparliga ovurstóran týdning, at kommunurnar verða noyddar at raðfesta íløgurnar, og so heldur lata onkra bíða í eitt ár ella tvey, hóast tað nóg mikið av peningi til hesi. Tí tann aktivitetur, sum byggivinnan kann skapa í minni góðum tíðum er altavgerandi í royndunum at tálma búskaparligu sveiggjunum. Og í búskaparligari niðurgongd eru tað sjáldan tey privatu, sum seta mest ferð á hesa vinnuna. Tí er alneyðugt við eini skipan, sum fær kommunurnar at halda aktivitetinum niðri í góðum og uppi í ringum tíðum.

Við hesum verður ikki sagt, at skipanin við íløguloftinum ikki kundi verið smidligari. Her kundi eitt hugskot verið, at lógarbundnar íløgur, sum fleiri kommunur nú hava fyri framman, ikki vigaðu eins nógv í íløgukarminum, og at rásarúmið til hesar tí varð gjørt nakað størri. Læna seg út sjógv kunnu kommunurnar kortini ikki, tá markið fyri lántøku er sett til eina ársálíkning.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# c d e f g a h c–Vitaminir

**Robert Mc. Birnie**



Nú veit eg ikki reiðiliga, um eg eri tann rætti at koma við hesi viðmerking. Eg eri kanska ein av teimum, sum kemur inn undir kategoriina hjá Sunnleivi: »Teir solariubrúnu kareoke døgnflugu-sangararnar«! – Men okey!! – so lat meg bert umboða hesar … solariubrúnu kareoke-døgnflugu-sangararnar …

Við jøvnum millumbilum øll tey 45 árini, eg havi fingist við tónleik og undirhald í míni frítíð, hava røddir verið frammi um, at nú skuldi tað verða. – Nú skuldi tónleikalívið stuðlast. – Hetta hava oftast verið politikarar, og fyri tað mesta hevur tað verið upp undir val. Í so máta var hetta valið onki undantak. – Men hvørja ta einastu ferð er ikki long tíð fráliðin, so er deyðatøgn.

Hesi seinastu árini hevur tað verið serliga týðuligt. – Fleiri av okkara ungu tónleikarum hava í seinastuni gjørt nógv um seg uttanlands. – Hvørja ferð hetta er hent hava serliga politikarar runnið á leistum. – Tikið ímóti, hildið talur, skrivað greinar um, at NÚ skuldi tónleikalívið í Føroyum stuðlast. – Tað gongur ein tíð … tøgn!!

Tað er ofta ført fram av fleiri enn mær, at tú kanst als ikki liva av at spæla tónleik í Føroyum. Tað vil siga, at øll tey lutvíst nógvu orkestrini í landinum er mannað við fólki, sum hava eitthvørt arbeiði, eru í læru, ella ganga í skúla. – Tað eru serstakliga hesi seinni, eg havi í huga. Tað er júst í tí aldrinum, tey byrja at spæla. Pening hava tey ongar, og ljóðførini og tónleikaútgerðin annars er sera dýr. – Eitt gott høvi at fíggja hetta, er við at fara út at spæla. – Tað verið seg til dans, veitslur ella annað. Hetta gevur eisini góða venjing, so tað er ikki burturspilt tíð.

Men hvat ger so skattamyndugleikin, sum politikararnir jú hava ábyrgdina av?? – Jú, samstundis sum tað ríka tónleikalívið í Føroyum verður hálovað bæði í skrift og í talu, ganga embætisfólk hjá toll og skatt inn á hvørja privata konto hjá føroyskum frítíðartónleikarum fyri at finna nakrar súrt vunnar hundraðkrónuseðlar.

Eg kundi komið við fleiri dømum, men eg ætli mær ikki her at fara í smálutir. – Tað hava bæði toll og skatt, mentamálaráðið og fíggjarmálaráðið fingið í ríkiligt mát gjøgnum hesi seinastu 2-3 árini.

Fyri umleið 8-10 árum síðani royndi F.U.T. – Føroya undirhalds- og tónleikarafelag, við Petur Mohr Reinert á odda at betra eitt sindur um umstøðurnar hjá tónleikarum. Tað var nevniliga soleiðis, at hini skandinavisku londini høvdu so mikið av virðing fyri hesi mentanargrein, at vanlig ljóðføri høvdu frá 0 til nøkur fá prosent í tolli, meðan 65% í tolli varð lagt á í Føroyum. Tað vil siga tað sama sum luksusvørur. Eftir tógvið stríð eydnaðist tað F.U.T. og Petur Mohr at kvinka tollin niður á nøkur og 20%. Men hvat, fá ár seinni kom so meirvirðisgjaldið, og so var støðan aftur tann sama.

Tískil havi eg her eitt heilt einfalt uppskot til frama fyri tónleika mentanina í Føroyum:

**UPPSKOT: Tónleika- og undirhalsvirksemið í Føroyum verður skattafrítt!**

**VIÐMERKINGAR:** Tónleikur og undirhald fer so gott sum bert fram í vikuskiftunum. Hetta avmarkar í fyrsta lagi virksemið til 50 vikuskiftir (Onkur høgtíð er, har onki virksemi er!) –

Sum áður nevnt mást tú hava annað arbeiði, lærupláss ella skúla, sum skal passast. Hetta avmarkar aftur virksemi. Ongin, sum eg veit um, arbeiðir hvørt vikuskifti í árinum. Um vit siga annaðhvørt, so er tað høgt sett. Tað skuldi so givið í mesta lagi 25 ferðir um árið.

Fara vit so at hugsa um útreiðslur kann leysliga nevnast:

Keyp av ljóðføri, tónleikaútgerð (forstyrkjarar, sanganlegg, mikrofonir, stativ o.a.) – reparatiónir, streingir, battarí, leidningar, flutningur, fløgur, telefon o.s.fr.

Sum sæst er ikki nógv at fara eftir.

**FYRIMUNIR:**

1. Sparing í løn til fólk at leita eftir hasum krónunum.
2. Fleiri fáa hug og ráð til at spæla.
3. Tey, sum hava mist hugin vegna hesa heksajakt, fáa kanska hugin at halda fram.
4. Prísurin fyri eitt orkestur verður aftur so rímuligur, at t.d. eitt ungt brúðarpar kann loyva sær at hava livandi tónleik.

Hetta uppskotið sendi eg fyri nøkrum árum síðani bæði til mentamálaráðið og fíggjarmálaráðið. – Eg havi bert fingið svar frá fíggjarmálaráðnum. Í svarinum er bert eittans argument fyri ikki at gera nakað sum helst við hetta uppskot, og tað er: »Tað ber ikki til at gera mun á samfelagsbólkum!«

So er tað eg spyrji: Hvat við 15% í skattalætta til sjómenn! Hvat við stuðlinum til handverkarar uttanlands! Og ikki minst, hvat við teim upp til 9.500 skattafríu krónunum um mánaðin til løgtingsmenn!

Vælgagnist øllum hesum, men argumentið heldur bara ikki!!!

# Vinir hittast í Esløv

NORRØNT SAMSTARV

*Tíðindi frá Norrønafelagnum*

Fólkaheilsa er høvuðsevnið á vinarbýastevnuni í Esløv í Svøríki í summar. Har hittast fólk úr býunum í vinarbýaketuni, sum Havnin einaferð var við í.

Stevnan verður frá 17. til 20.juni. Á skránni er seminar um børn og heilsu, arbeiði og heilsu og mentan og heilsu. Eitt annað seminar er um viðurskiftini hjá teimum ungu í Norðurlondum.

Annars eru útferðir, frítíðarítriv, veitslur og ekumenisk uttanduragudstænasta á skránni.

Men fyrst og fremst eru norðurlendsku vinarbýastevnurnar eitt gott høvi hjá fólki úr Norðurlondum, eisini úr Føroyum, at hittast í vinalagi og knýta bond, sum vara alt lívið.

Freistin at tekna seg er til mánadagin 15.mars.

Upplýsingar og tilmeldingarblað fáast hjá Norrøna Felagnum Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

Apropos føroyska málið

# Latið altjóða føroyska alfabetið við C, Q, W, X og Z fáa sítt frælsi aftur

**– og loyvið móðurmálinum at mennast á lingvistiskum ástøði!**

**Regin Eikhólm**



Kunningartøknin við sínum globala telesamskifti hevur vent upp og niður upp á gomlu innlæringarhættirnar. Tíðin, tá ættarlið eftir ættarlið brúkti somu lærubók, er farin, og spírandi altjóða frælsislyndi í hugaheiminum hjá yngra ættarliðnum setir føroyska málinum alt størri samtíðarkrøv. Hetta er eisini við til at leggja størri trýst á okkara skriftmál við kravi um førleika til natúrliga og óskert at kunna endurgeva móðurmálið.

Skriftmálið hjá V. U. Hammershaimb, sum í høvuðsheitum byggir á eina søgufjøtraða filologiska konservatismu, megnar ikki nóg væl at endurgeva móðurmálið, hóast hetta skriftmálið hevur verið einaráðandi í útvið 150 ár og hevur havt tíð til at laga seg. Tað kann viðhvørt tykjast sum um fordums nýfikni og takklæti fyri, at vit yvirhøvur fingu eitt skriftmál, hevur blinda okkara sjálvráðandi málmyndugleika soleiðis, at teir ikki (vilja) síggja, at skriftmálið hevur broytingar fyri neyðini, um tað skal kunna umboða móðurmálsligan førleika. Heldur umvent hevur higartil verið roynt at laga móðurmálið til skriftmálið.

**Amputerað alfabet**

Globaliseringin ger, at vit meira enn nakrantíð hava brúk fyri tí altjóða føroyska alfabetinum, sum vit lærdu fyrr, men sambært Stavtalvu 2000 hjá Føroya Skúlabókagrunni eru bókstavirnir C, Q, W, X og Z ekskluderaðir. Alment standa vit sostatt eftir við einum amputeraðum alfabeti, ið als ikki nøktar okkara málsliga bókstavatørv. Í staðin fyri eina natúrliga tillagaða málsliga expansión hava vit fingið eina málsliga degeneratión, og við søguliga eftirgjørda skriftmálinum sum referencu-rammu verður føroyingurin dagliga fremmandagjørdur fyri sínum egna móðurmáli. Úrslitið kenna vit alt ov væl. Henda áhaldandi móðurmálstrælkanin hevur fingið mangan føroyingin at halda, at hann ikki dugir at tosa føroyskt, tí tað hann tosar víkir frá tí V. U. Hammershaimb'sku doktrinini!

Tað bøtir sjálvandi ikki um støðuna, at sjálvráðandi málmynduleikin við sínum erkvisna nationalpuristiska hugráki hevur verið eksponentur fyri polariseringina av málinum í tað danifoba ávikavist tað íslandifila rákið. Hetta hevur í ávísan mun gjørt tvímálsliga førleika føroyinga til eitt handicap heldur enn til ein fyrimun, og stendur tað til professorala málførleikan, verður onki broytt í bræði, tí skriftmálið er gott sum er, sigur hann í samrøðu við Útvarp Føroya nú um dagarnar.

Um tað so er føroyska telefonbókin, so vísir eisini hon klárt á tørvin fyri einum broyttum málpolitikki, tí har finna vit hópin av vanligum føroyingum og føroyskum fyritøkum hvørs nøvn byrja við ella innihalda onkran av ekskluderaðu bókstavunum.

**Gamlar bygdagøtur ella nútímans vegir og berghol**

Um Landsverkfrøðingurin skuldi arbeitt eftir sama leisti sum ráðandi málmyndugleikin ger, so gjørdi Landsverkfrøðingurin bert vegir við atliti til gomlu bygdagøturnar við søguligum varðunum (filologiskt ástøði), og ikki við atliti til tann aktuella tørvin. Men Landsverkfrøðingurin arbeiðir nútímans og kannar bæði struktur og virksemi (lingvistiskt ástøði) áðrenn hann fer undir at gera tær samskiftisleiðir - vegir ella berghol - ið best nøkta tørvin, men virðingin fyri teimum gomlu bygdagøtunum er tann sama.

Gásadalur er eitt gevandi dømi. Yvir fjallið ella gjøgnum bergholið. Í dag standa hesir báðir møguleikar opnir, men soleiðis er ikki statt á málsliga økinum, tí har er framhaldandi bert loyvt at ganga eftir gomlu V. U. Hammershaimb'sku " bygdagøtuni, har teir søguligu fikseraðu varðarnir enn sum fyrr vísa vegin.

Góvu vit hinvegin málinum sama valmøguleika, sum Gásadalsfólk nú hava, hevði lingvistiska ástøði vunnið frama, og ajourførda skriftmálið hevði tá kunna rúmað alt frá tí basalt vísindaliga til tað meiri abstrakta vitborna.

**Málið fyri øll**

Kravið til málið í dag er, at tað skal rúma einum viðkomandi funktionellum samskiftismiðli fyri øll, og ikki bert fyri ein útvaldan skarða. Ein kanningin herfyri vísti, at okkara stummu filologisku ð'ir eru fyri ungdóminum sum abstraktir fótonglar at rokna, men tað er vælkent, at nærri framburðinum eitt skriftmál liggur, tess betri eru fólk til at stava málið. Intellektuelt er unga ættarliðið helst betri fyri enn nakrantíð, og vit hava eina kompetenta undirvísing, so alt bendir á at sjálvur málpolitikkurin hevur broytingar fyri neyðini. Tey ungu ganga ikki longur í húðarskóm! Eitt grundleggjandi krav til skriftmálið má vera, at tað skal kunna endurspegla móðurmálið og ikki umvent. Har afturvendandi trupulleikar eru, má málið gerast meiri funktionelt og viðkomandi við atliti til tað tosaða málið.

Danir hava tikið við læru frá eingilsmonnum, og ásanna at tað ber væl til at samansjóða móðurmálið og læknalatín. Í 1991 avtóku danir sostatt kravið um dokumenteraðan latínkunnleika fyri lækna- og tannlækna lesandi. Kanska teir kundu hjálpt okkum við skriftmálinum til móðurmálið?

**Køvandi bábylonsk máløsing**

Altjóða føroyska alfabetið hevði nøktað øllum tørvi á heimafrontinum umframt at rúma mest alt av norðurlendsku alfabetunum og tí enska alfabetinum.

Við altjóða føroyska alfabetinum høvdu vit sloppið undan tí afturvendandi køvandi bábylonsku máløsingini, og óneyðugt hevði verið at týtt ella umdoypt øll heimsins nøvn og hugtøk til "finn upp á føroyskt" ella torskilt stavtalvu-føroyskt. "Hug en hæl og klip en tå" (H. C. Andersen), men gongulagið verður hareftir!

Ein meiri altjóða terminologi og normar annars høvdu kunna givið okkum stóran fyrimun millum annað á útbúgvingarøkinum, tí størru málini hava ráð til kontinueruliga menning av lærubókum. Tað hava smáu málini sum føroyskt hvørki fólk ella fíggjarorku til, og tí kunnu vit gerast eftirbátar, um vit halda fast við verandi málpolitik.

**C, Q, W, X og Z hava vitalan týdning í føroyskum skriftmáli**

Í tí dagliga brúka vit C-vitaminir, C-tónan og celsius stig ella gradir, °C, og neyvan nøkur starvsumsókn fer avstað uttan hjálagt C V, curriculum vitæ (lívsgongdarlýsing). Victoria hevur eisini krav uppá sítt C, nú djørvu og treisku foreldur hennara endiliga fingu teirra sjálvsagda rætt til føroyska familjunavnið. Og ikki at gloyma C'ið hjá javnaðarflokkinum.

Vit brúka eisini altjóða styttingarnar fyri grundevnir, sum vit kenna frá periodiska grundevnissysteminum. Hesar eru eitt must innan náttúruvísind eitt nú innan nýggju fiskivinnugranskingina, tá kemisku processirnar skulu útgreinast. Har hevur C ein ómissiligan týdning. Styttingin C stendur her fyri kolevni, Ca fyri kalsium, Cr fyri krom, Cu fyri kopar v.fl.

Ì grundevnis-heiminum annars hava vit W fyri wolfram, Xe fyri xenon og Zn fyri sink. Vanliga brúka vit Watt fyri orku, WC fyri Water Closet, umframt at X og Z verða nógv nýttir í matematiska heiminum. Rómartøl eru eisini vanlig hjá okkum, har C stendur fyri 100 og X stendur fyri 10. Helst skuldu vit eisini kunna stava til heimlig fyribrigdir so sum Prix Føroyar, Jazzfestivalin ella Atlantic Airways. Hjá flestu okkara er eisini stórur munur á seks og sex?

Q stendur kanska eitt sindur fyri seg sjálvan, men status quo er vælkent og ofta brúkt. Annars kemur Q fyri í fleiri orðum og mongum praktiskum styttingum í altjóða samanhangi, og er qua tað ikki uttan týdning! Vit kundu hildið áfram, men hetta er bert fyri at endurtaka nøkur fá ítøkulig dømir, sum fleiri av okkara frælslyntu málfrøðingum og aðrir áhugaðir móðirmálslingar áður hava ført fram - bæði í skrift og talu.

**Umbøn og áheitan til allar politiskar ábyrgdarar og móðurmálslingar:** Latið altjóða føroyska alfabetið við C, Q, W, X, Z fáa sítt frælsi aftur og mennið skriftmálið á lingvistiskum ástøði so tað kann liva upp til heitið "móðurmál fyri allar føroyingar" við rætti til navna-, skrivi- og frálærufrælsi umframt potentiali til altjóða førleika. Takk fyri.

Nakrar vimerkingar til málið:

# Skeinkiloyvið til dansistað í Runavík

**Símun Petur Jacobsen**

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi í fjølmiðlunum um eina umsókn um skeinkiloyvi til eitt dansistað í Runavíkar kommunu. Tað undrar meg als ikki, at ymiskar hugsanir eru um eitt slíkt tiltak, men tað sum undrar meg almikið er tann viðgerð, ið hevur verið í Degi og Viku av hesum máli. Mín góði vinur Ingolf Olsen hevði, eftir mínum tykki, eina sera løgna niðurstøðu í sendingini mánakvøldið 8. mars. Ingolf Olsen slær fast, at tey í Runavíkar Býráð als onga grundgeving hava fyri síni støðutakan annað enn, at tey eru ímóti nýstlu av rúsdrekka í síni heild. Eg sat eftir við eini løgnari kenslu, hópin av ósvaraðum spurningum. Her eru nakrir:

1) Kann Runavíkar Býrráð geva loyvi til eitt dansistað (við ella uttan skeinkiloyvi) á havnalagnum? (tað verður t. d. ikki givið loyvi til eitt bilverkstað á havnalgnum)

2) Hví skal eitt dansistað hava skeinkiloyvi, um endamálið við dansistaðnum er at virka sum savningarstað fyri ungdóm? - tað er jú ikki loyvi at skeinkja til fólk undir 18 ár.

3) Einasta grundgeving, ið er nevnd fyri at geva skeinkiloyvi, er at tað ber ikki til at fáa eitt dansistað at bera seg uttan skeinkiloyvi. Merkir hetta so, at feløg og fyritøkur sum hava fíggjarligar trupulleikar kunnu fáa skeinkilovyi fyri at fáa raksturin at geva yvirskot?

4) Hvussu ber tað til, at borgarstjórin í Runavíkar Býráð kann verða við til at viðgera hetta mál - tá hann er ein av ánarunum av bygninginum sum dansistaðið skal verða í? - Møguliga má skeinkiloyvi til fyri at fáa leiguinntøkurnar á rætt støðið?

5) Hvussu ber tað til, at onnur feløg í Runavíkar kommunu (ítróttarfeløg og samkomur) kunnu reka eitt ríkt ungdóms-arbeiðið - uttan skeinkiloyvi ?

6) Er skeinkiloyvi tað, sum ungdómurin í Runavíkar kommunu rópar eftir? Er tað ikki heldur betur umstøður - t. d. hølisumstøður ?

7 Hvussu ber tað til, at tá tað á demokratiskan hátt ikki verður givið loyvi til umrøddu umsøkn, at hetta so ikki verður góðtikið, men skal á ein ellan annan (um neyðugt ódemokratiskan hátt) trýstast ígjøgnum.

8) Er veruliga endamálið við umrøddu umsókn ikki ein roynd at fáa hjálp til at koma inn á politiska pallin so ella so, heldur enn at geva ungdóminum í Runavík eitt tilboð?

Í sendingi fær hyggjarin ta fatan, at fjøldin í Runavíkar kommunu er ímóti tí avgerð, Runavíkar Býrráð tók. Mín metan er tó júst tann øvugta. Eg vil enda við at takka tykkum, sum atkvøddu nei, tá málið var til viðgerðar fyri eftir mínum tykki eina seriøsa viðgerð av málinum.